# Demokratia handar álit

Hósdagin 20. desember fer Demokratia – Nevndin fyri øktum kvinnuleikluti í politikki – at handa Bjarna Djurholm, landsstýrismanni, álit sítt. Í álitinum verður greitt frá nevndararbeiðinum higartil. Eisini hevur nevndin gjørt fleiri tilmæli til, hvussu kann arbeiðast víðari fyri at økja um kvinnuleiklutin í politikki. Tað er óvist, um Demokratia fer at halda fram í 2008. Nevndin hevur arbeitt í hálvtannað ár og skal eftir ætlan niðurleggjast um ársskiftið. Tjóðveldi hevur lagt uppskot fram um, at nevndin skal halda fram í 2008, men uppskotið fall burtur, tá løgtingsval varð útskrivað.



*Eyðgunn Samuelsen er forkvinna í Demokratia*

# Línuskipini eiga flestu ársverkini

**Tað eru framvegis línuskipaflotin, sum hevur nógv tey flestu ársverkini í føroysku fiskiskipavinnuni. Á øðrum pássi koma partrolararnir**

FISKIFLOTI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á framløgufundinum, sum grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe skipaðu fyri í síðstu viku, fingu vit eisini eina talvu, sum sýnir samlaðu ársverkini í føroyska fiskiskipaflotanum.

Eins og øll hini árini, síðan felagið fór undir sína greining, eru tað línuskipini, sum hava tey flestu ársverkini. Hetta kemst í fyrsta lagi av, at skipini eru so nógv í tali, og haraftrat kemur, at manningartalið er so stórt. Flestu línuskip hava 14 mans við hvønn túrin.

Taka vit ársverkini í føroyska fiskiskipaflotanum sum heild síðan ár 2002, vuksu hesi árini 2002-2003, men øll árini síðan eru tey vorðin færri í tali.

Samlaða talið av ársverkum í 2002 var 1.151, og árið eftir var talið 1.190 – ella 39 fleiri. Síðan hevur talið verið minkandi, til ársverkini í 2006 vóru 1.052 í tali, sum er 99 færri.

Árini 2005-2006 gjørdust ársverkini 3,2% færri.

Tilsamans 327 ársverk vóru í línuskipaflotanum í 2006, og á øðrum plássi komu ársverkini umborð á partrolarunum, sum vóru 141 í tali.

Á triðja plássi komu verksmiðjutrolararnir við 130 og á fjórða plássi ársverkini umborð á tí, sum í greiningini verður rópt ”onnur skip, við 129 ársverkum.

Flestu av teimum 129 ársverkunum við øðrum skipum, eru burtur, tí uppi í hesum var manningin umborð á Atlantic Navigator, sum ikki er longur í føroyska fiskiskipaflotanum.

Teir skipabólkar, sum stóðu seg best í 2006, vóru pelagisku skipini og verksmiðjutrolararnir. Hesir høvdu ávikavist 111 og 130 ársverk í 2006.



*Tað eru framvegis línuskipini, sum eiga tey flestu ársverkini í føroyskari fiskiskipavinnu – við 327 ársverkum í 2006*

*Mynd: FMF*

# Partrolararnir eru flestir í tali



*Partrolararnir eru næststørsti skipabólkur í uppgerðini fyri 2006, nevniliga 22 í tali*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Í yvirliti, sum grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe hava gjørt, sæst, at størsti skipabólkurin í tali eru línuskipini, sum eru 24. Á øðrum plássi koma partrolararnir, sum eru 22 í tali í 2006**

FISKIFLOTI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tilsamans 80 føroysk fiskiskip eru við í greiningini, sum grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe hava gjørt yvir fiskiskipaflotan fyri árið 2006.

Hetta er minsta tal av skipum, sum eru við við í greiningini, síðan felagið fór undir hetta arbeiði í 2002.

Í 2002 var samlaða talið av skipum, sum vóru við í greiningini 88, og árið eftir vóru tey 91. Í ár 2004 og 2005 vóru skipini ávikavist 86 og 85 – og síðan 80 í ár 2006.

Grannskoðarafelagið sigur, at ymiskar orsøkir eru til, at nøkur skip, sum annars eru partur av føroyska fiskiskipaflotanum, ikki eru við í greiningini.

- Okkurt skip hevur ikki latið inn roknskap fyri 2006, og í onkrum føri eru skip løgd. Í uppaftur øðrum føri er talan um onnur feløg, eitt nú kommanditfeløg, sum ikki hava almennan roknskap, sigur grannskoðarafelagið.

Í 2006 var talið av skipum hetta: Línuskip (24), partrolarar (22), lemmatrolarar (11), pelagisk skip (8), garnaskip (5), verksmiðjutrolarar (4), rækjuskip (3) og onnur skip (3).